## Jens Kristian á beinkinum

At B36 hevði nakað av fráveru í hópinum sást á beinkinum til dystin sunnudagin. Millum menninar her var nevnliga Jens Kristian Hansen, sum annars gavst á besta liðnum fyri trimum árum síðani. Í ár hevur hann soleiðis bert hugnað sær í 3. deild, har hann vann silvur fyri viku síðani. Men hesa ferð hevði Heðin Askham heitt á 37 ára gamla veteranin um at taka eitt lítið tak afturat.



## Torres er tann besti

Venjarin hjá Liverpool. Rafael Benitez, heldur, at Fernando Torres er heimsins besti álopsspælari í løtuni. Torres skoraði 24 mál í sínum fyrsta kappingarári í Premier League, og hann hevur fingið flúgvandi byrjan í nýggja kappingarárinum. - Eg hevði ikki býtt Torres um við nakran annan spælara. Tað eru nógvir góðir spælarar kring um í heiminum, men eingin teirra er betur enn Torres, sigur Benitez.

## Ótrúligt

Hanus Thorleifsson mátti eftir dystin ásanna, at hann ongan tíð áður hevði verið partur av einum dysti, sum tók eina somikið ógvusliga vend, sum dysturin við Margáir gjørdi sunnudagin.

- Tað havi eg so bestemt ikki. Og serliga ikki í dysti móti tí liðnum, sum liggur til at vinna føroyameistaraheitið.

Men hvat var tað, sum gjørdi, at tit eftir steðgin kunnu koppa øllum so fullkomuliga á høvdið.

- Vit tosaðu um tað í hálvleikinum. Vit høvdu fingið tvey skjót mál, og EB/Streymur skapti heldur ikki tað stóra. Teir høvdu nøkur vandamikil skot, men so heldur ikki nógv meira. Og vit vistu, at vit kundu væl skjóta tvey mál, so vit bardust.

Men tit hava ikki fyrr í ár víst, at tit kunnu skjóta bæði trý, fýra og fimm mál?

- Nei, tað hevur tú rætt í. Vit nokk bara eina ferð skotið fýra mál í ár, og á útivølli høvdu vit ongan tíð skotið meira enn tað eina málið. So hetta var kanska ótrúligt.

Og ber sigurin við sær, at tit enn trúgva upp á gullið, ella eru tit bara betur fyri í stríðnum um silvurkrónurnar?

- Tað er nokk meira í silvurstríðnum, at hetta ger mun. Skuldu vit enn havt ein lítlan møguleika fyri gullinum, so skuldu vit nokk skotið fleiri mál fyrr í ár. Men tað hevði eisini nógv at siga, at vit ikki avreiddu gullið. Tað hevur væl nakað við stoltleika at gera, segði Hanus Thorleifsson eftir dystin.

**-mørk**

EB/Streymur-B36 4-5 (3-2):

# Eigur ikki at bera til

**Enn eru tvey skot eftir í byrsuni. Men hóast eina ótrúliga endurreisn av B36, so skerst ikki burtur, at EB/Streymur regulert tveitti sær næsta gullbóltin burtur**




FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

*EB/S*

*B36*

Gummiroykurin man hanga í luftini líka frá Kollafirði til Gjáar eftir dystin hjá EB/Streymi móti B36.

Ivaleyst eru fólk har á leiðini vorðin troytt av at hoyra um møgulig gummibein, nú lokalu fótbóltshetjurnar royna at taka seinastu fetini móti gullinum. Men tað slepst ikki undan hugtakinum hesaferð.

Talan var nevnliga um gummibein, so tað baskar. Eftir at hava rist fyrsta stóra skelkin av sær, spældi EB/Streymur dreymabólt í 7 minuttir, og við hálvleiksleiðslu, einum manni í yvirtali og í veruleikanum bara tørv á einum stigi, skuldi alt verið í pottinum, har sjampanjan hevur prutlað undir lokinum síðani eina ferð í juni mánaði ella so.

### Tora ikki at vinna

Tað eru tveir lutir, sum hava týdning, um tú skalt vinna nakað sum helst í ítrótti.

Fyrsta fortreytin er, at tú skalt tora at vinna. Duga at kenna teg tryggan, tá tú ert á odda, og á tann hátt ikki fáa trupulleikar við at koyra sigrarnar heim.

Harnæst er tað ein ævigur sannleiki, tú skalt tora at fremja mistøk. Spenni millum tað at góðtaka eitt mista og tað, sum tú tá torir og vil í ítróttinum er proportionalt vaksandi. Við øðrum orðum: Torir tú als ikki at gera mistøk, torir tú heldur ikki at spæla.

Og fyrst og fremst var tað hetta, sum rakti EB/Streym frá byrjan sunnudagin. Hóast teir vóru ónøgdir um hornasparksdómin, sum førdi til fyrsta málið, so var tað eitt málverjamistak, sum gav Inga Højsted møguleikan. Og hóast Egil á Bø vildi hava fríspark undan næsta B36-málinum, so kundi hann forðað fyri hesum við eitt sindur meira avgjørdum verjuspælið.

### Gyltir minuttir

Sjey fantastiskir minuttir koppaðu tó øllum á høvdið.

Upptaktin var kanska nakað ivasom, tí nógv kring vøllin mettu Arnbjørn T. Hansen vera rangstaddan, tá hann varð spældur leysur. Men tá Odmar Færø skræddi hann niður í skotrøyndini, hevði dómarin bara eitt val. Nevnliga brotsspark og reytt kort.

Brotssparkið sendi Bárður Olsen í netið, og áðrenn B36 hevði umskipað seg, var EB/Streymur aftur á gullkósini. Høgni Zachariassen kanónstútaði til 2-2, og Hans Pauli Samuelsen sendi eina perlu undan vindinum og undir tvørtræið til 3-2.

Og hóast álopsspælið ikki var heilt so spruttandi fram til steðgin, so var nú eingin ivi kring vøllin. Við einum manni í yvirtali móti einum B36-liði, sum – sæð burtur frá hesi ferðini – ikki hevur skorað meira enn tað eina málið á útivølli, kundi ikki ganga galið!

### Gekk galið

Men tað kundi tað nú kortini.

Einki skal takast frá B36, tí talan var um framúr endurreisn frá teira síðu. Hóast ein mann í undirtali, so royndu teir støðugt at trýsta EB/Streym langt uppi á vøllinum. Igni Højsted og Jákup á Borg arbeiddu ein ávísan likamspart úr buksunum, og Dmitrij Jankovic, sum annars hevði vanliga útgangsstøðið sum verjuskipari, var her, har og allastaðni. Hægstur við høvdinum, um EB/Streymur flutti bóltin fram, og altíð klárur at hótta í álopspartinum.

Men líka so fantastiskt sum B36 var. Eins ússaligt var avrikið hjá heimamonnunum eftir steðgin.

Tí teir tordu ikki at vinna. Gjøgnum seinastu trý korterini vóru spælararnir fullkomuliga steinrunnir. Tað var so eiðasørt, at nakrar sum helst flytingar vóru uttan bólt, og tí kundi B36 við bara 10 monnum leggja trýstið høgt uppi.

Ferð eftir ferð bakkaði verjan undan hvítu áleyparunum, og í tveimum førum mátti René Tórgarð stórbjargað, tá eingin hevði hug at tackla menn, sum løgdu an til skot.

Tað kundi næstan bara ganga galið, og tað gjørdi tað eisini. Fyrst hálvsvav